Skrás. nr. P/F 4627

# Ársfrásøgn
2009

Betri pensjón



## INNIHALDSYVIRLIT


| | |
|---|---|
| PARTAFELAGSUPPLÝSINGAR | 3 |
| LEIÐSLUFRÁGREIÐING | 4 |
| NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR | 8 |
| 5 ÁRA YVIRLIT | 9 |
| ÁRSFRÁSØGN 1. JANUAR – 31. DESEMBER | 10 |
| FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER | 12 |
| NOTUR TIL ÁRSFRÁSØGNINA | 14 |
| LEIÐSLUÁTEKNING | 20 |
| ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARUM | 21 |


## PARTAFELAGSUPPLÝSINGAR

**FELAGIÐ:**
Betri Pensjón P/F
Skrás. nr. P/F 4627
Roknskaparár 3
Heimstaður: Tórshavn

**NEVND:**
Gunnar í Liða, formaður
Jákup Birgir Mohr
Regin Hammer

**STJÓRN:**
Mortan Poulsen

**GRANNSKOÐAN:**
NOTA, løggilt grannskoðanarvirki P/F
HANSAM, grannskoðarafelag Sp/f

**ÁRSAÐALFUNDUR:**
Ársaðalfundur verður hildin eftir nærri áseting.

# Leiðslufrágreiðing

## ÚRSLITIÐ FYRI 2009

Tað góða rákið á fíggjarmarknaðinum setti sín dám á 2009 hjá Betri Pensjón P/F. Samlað kastaðu partabrævadeildirnar, sum Betri Pensjón P/F nýtir, nærum 25% av sær, og merkir hetta eisini, at tapið frá 2008 nærum er vunnið innaftur.




Í ársfrágreiðingini fyri 2008, metti leiðslan inntøkurnar fyri 2009 at kunna økjast til 40 mió. kr. og náddi felagið hesum málið.
Úrslitið eftir skatt var eitt hall uppá 7,2 mió. kr. móti einum halli í 2008 uppá mió. 12,8 kr. Betri Pensjón P/F fekk eisini í árinum ágóða av tí góða fíggjaravkastinum. Tryggingargjøldini íroknað innskot vuksu frá 25,4 mió. kr. til 42,1 mió. kr., og er hetta væl meira enn mett í fíggjarætlanini fyri 2009.
Sum kunnugt er Betri Pensjón P/F ein partur av TF samtakinum, og var í 2009 farið undir eitt nýtt átak, har allir kundar, ið rindaðu meira enn 18.000 kr. í pensjónsgjaldi, fingu ein avsláttur uppá 20% av tryggingargjaldinum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum P/F.
Hetta tilboðið fekk eina sera góða móttøku og var ein partur av tí framgongd, sum árið gav.
Avtala var gjørd við tað fyrsta fakfelagið, tá Betri Pensjón P/F í desember gjørdi avtalu við Føroya Lærarafelag. Avtalan er galdandi frá 1. januar 2010.
Fíggjarinntøkurnar vóru sum nevnt framúr góðar í 2009 og góvu eitt avkast upp á 9,7 mió. kr. móti einum halli í 2008 upp á 7,7 mió. kr.
Rakstrarútreiðslurnar vuksu frá 11,4 mió. kr. til 13,5 mió. kr. Eginognin hjá Betri Pensjón P/F var 31,8 mió. kr. við árslok 2009.
Samanumtikið er úrslitið nøktandi, tá bert verður hugt at tilgongdini av kundum og pensjónsinntøkum, sum er betri enn mett var í fíggjarætlanini fyri 2009.

## OPINLEIKI OG GJØGNUMSKYGNI

Síðani Betri Pensjón P/F kom á marknaðin, hava vit miðvíst arbeitt við at økja um opinleikan og gjøgnumskygni, tá pensjón umrøður. Alt ov ofta eru vit í sambandi við viðskiftafólk, ið ikki eru greið yvir, hvussu teirra pensjónsviðurskifti eru, ella hvussu teirra pensjónsskipan verður umsitin. Stórur dentur hevur tí verið lagdur á opinleika og gjøgnumskygni. Heimasíðan hjá Betri Pensjón P/F er ment við hesum fyri eyga, og kunnu viðskiftafólk, við at logga seg á, síggja hvørjar tryggingar tey hava, hvat hesar kosta, og hvat verður tikið fyri umsiting. Vit meina, at hetta er ein avgerðandi fortreyt fyri at gera seg galdandi á marknaðinum í dag, og fara vit í 2010 at menna hesa skipan uppaftur meira.

## PENSJÓNSSAMANSPARINGIN Í 2009

Betri Pensjón P/F teknar sínar pensjónir til marknaðarrentu. Í londunum rundan um okkum fara fleiri pensjónsfeløg frá teimum vanligu pensjónunum við fastari treytaðari rentu yvir til marknaðarrentu, og er tí lítil ivi um, at hetta verður framtíðarhátturin at skipa eftirlønina uppá, og hesin kemur at loysa av tær síðbundnu pensjónirnar.

## 2009 GJØRDIST EITT SØGULIGT ÁR

Lítil ivi er um, at 2009 fer í søguna sum eitt heilt serligt ár.
Niðanfyri er víst, hvat 100 krónur, ið vórðu settar í pensjón í 2008, blivu til:




Fíggjarkreppan, sum gjørdist ein búskaparkreppa, helt á at herja í 2009, og sum nakað heilt serligt vóru at kalla allir heimsins búskapir í afturgongd part av árinum. Av somu orsøk fór 2009 eisini í søguna sum árið, har búskaparligir hjálpar- og bankapakkar, av eini støðd, sum vit ongantíð hava sæð áður, vórðu settir í verk runt allan knøttin. Búskaparliga afturgongdin gjørdi, at sera stimbrandi peningapolitikkur varð førdur soleiðis, at alheims leiðandi rentur náddu metlág stig. Ógvusligu hjálpartiltøkini hava gjørt, at búskapirnir við metferð eru farnir frá afturgongd aftur til framgongd.

## VIÐMERKINGAR TIL FÍGGJARSTØÐUNA

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón P/F vaks frá 65,1 mió. kr. til 108,6 mió. kr. í 2009. Avsetingarnar fyri Unit Link sáttmálar vuksu frá 21,8 mió. kr. til 67,9 mió. kr. Eginognin var pr. 31. desember 2009 31,8 mió. kr. móti 24,0 mió. kr. í 2008.

## KAPITALSTYRKI

Felagið er sterkt í mun til sínar tryggingarligu skyldur.

| DKK 1.000 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| Eginogn | 31.802 | 23.984 |
| Immatriell aktiv | -3.383 | -4.613 |
| Grundarfæfeingi | 28.419 | 19.371 |
| Fæfeingiskrav | -24.000 | -24.000 |
| Kapitalstyrki | 4.419 | -4.629 |

Tá felagið var stovnað, varð roknað við halli tey fyrstu árini, og kapitalstyrki felagsins er eisini fallið nakað vegna stóra kursfallið av fíggjarognum í 2008.
Neyðugt hevur tí verið við meira kapitali, og hevur felagið fingið tilført 15 mió. kr. í 2009.

Mett verður, at felagið nú hevur ta neyðugu fíggjarligu styrkina við atliti til tey lógarkrøv, ið eru galdandi.

## STÝRING AV VÁÐA

Betri Pensjón P/F metir váða at umfata øll viðurskifti, ið kunnu hava negativa ávirkan á møguleikar felagsins at náa síni handilsligu mál. Felagið hevur væl skipaðar mannagongdir fyri stýring av váða, umfatandi yvirskipaðar leiðreglur frá nevndini, sum stjórnin og leiðslan annars støðugt halda eyga við.



Felagið er í høvuðsheitum ávirkað av hesum váðum:

| FÍGGJARLIGIR VÁÐAR | TRYGGINGARLIGIR VÁÐAR | OPERATIONELLIR VÁÐAR |
|---|---|---|
| Marknaðarváði | Livitið | KT-váðar |
| Gjaldførisváði | Deyðstíttleika | Løgfrøðiligir váðar |
| Mótpartsváði | Avlamistíttleika | Umsitingarligir váðar |
| Spjaðingarváði | Spjaðing | Svik |
| | | Umdømi |
| | | Strategi |

## FÍGGJARLIGIR VÁÐAR

Marknaðarváðin er váðin fyri, at dagsvirðið á aktivum felagsins broytast vegna broytt marknaðarviðurskifti so sum rentu, kursi v.m. Fyri Betri Pensjón P/F er marknaðarváðin nógv tann størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv, saman við eini varisligari íløgustrategi fyri partabrøv. Eisini verður marknaðarváðin avmarkaður av, at felagið grundar sítt virksemi á Unit Link tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan. Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti.
Gjaldførisváðin er váðin fyri at staðfesta tap vegna at skula frígeva gjaldføri fyri at kunna rinda sínar skyldur innan ein stuttan tíðarkarm. Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í likvidum, børsskrásettum virðisbrøvum.
Mótpartsváðin er váðin fyri tapi vegna tess, at mótpartar ikki halda sínar skyldur. Mótpartsváðin verður m.a. avmarkaður við at hava samstarv við ein íløguumsitara, sum hevur gott orð á sær og hevur drúgvar royndir.
Vantandi spjaðing kann føra tap við sær, um íløgur í ov stóran mun eru bundnar í ávísar vinnur ella marknaðir o.s.fr. Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í ymsar vinnur og marknaðir og við at avmarka íløgur í sama útskrivara. Íløgureglurnar fyri partabrøv leggja upp til at spjaða íløgurnar í partabrøv við atliti at vinnugreinum og londum. Somuleiðis umfatar spjaðingarváðin, at kundar felagsins kunnu missa týðandi partar av síni uppsparing vegna ov lítla spjaðing av íløgunum. Henda váða hevur felagið avmarkað kundanna vegna fyri flestu produktini við at broyta samansetingina av íløgum, so hvørt sum kundarnir nærkast pensjónsárunum.

## TRYGGINGARLIGIR VÁÐAR

Teir tryggingarligu váðarnir viðvíkja gongdini í deyðstíttleika, avlamistíttleika v.m. T.d. økir hækkandi livialdur veitingar felagsins til eftirlønir, meðan talið av andlátum og sjúkrameldingum ávirkar veitingar til veitingar vegna deyð og sjúku. Av tí at felagið í høvuðsheitum hevur lagt seg eftir Unit Link tryggingum, har kundarnir fáa eftirløn eftir, hvørja íløgustrategi teir sjálvir hava valt, eru tryggingarligu váðarnir ikki so stórir.
Spjaðingarváði í.s.v. tryggingarligar váðar umfatar vandan fyri tapi vegna stóra eksponering til einstakar kundabólkar og einstakar persónar. Felagið avmarkar tryggingarligu váðarnar við spjaðing av tryggingarmongdini millum ymiskar kundabólkar, við hámørkum fyri ymsum tryggingardekningum og við endurtrygging.

## OPERATIONELLIR VÁÐAR

Felagið kann koma út fyri fíggjarligum tapum vegna operationellan váða, ella hesin kann skaða umdømi felagsins. Operationellir váðar umfata váða fyri tapi vegna feilir í KT-skipanum, løgfrøðiligum ósemjum, ikki nøktandi ella skeivum mannagongdum ella sviki. Felagið avmarkar operationellan váða við innaneftirliti og funktiónsskilnaði, sum støðugt verður endurskoðað og dagført. Harumframt fylgir felagið neyvt við gongdini á marknaðinum við atliti til at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarførr. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundar.

## VITANARSTØÐI

Fyri Betri Pensjón P/F er tað av alstórum týdningi, at starvsfólk hava høgt vitanarstøði. Øllum starvsfólkum verður tryggjað viðkomandi útbúgving og eftirútbúgving til tess at økja førleikarnar at veita felagsins kundum eina holla ráðgeving.

## MENNING

Betri Pensjón P/F leggur stóran dent á at betra um kappingarføri við øðrvísi tryggingarproduktum, og tað verður støðugt arbeitt við menning á hesum øki.

## ETISKAR REGLUR Í SAMBANDI VIÐ ÍLØGUR

Kjak hevur verið í okkara grannalondum og í Føroyum um, hvussu tann uppspardi peningurin verður umsitin, og hvørji etisk krøv verða sett til íløgurnar.
Dagført yvirlit yvir hvørjar fyritøkur eru fevndar av omanfyri nevndu íløguprógvum, kann fáast til vega á www.sparinvest.dk og www.sparindex.dk.
Í 2010 verður gjørt uppaftur meira við at tryggja, at íløgurnar liva upp til tær etisku meginreglur, ið eru galdandi, og strembað verður eftir at liva upp til standardkrøvini hjá ST, ið eru feld niður í sonevndu UN PRI avtaluna.

## VÓNIR FYRI 2010

Betri Pensjón P/F fer í 2010 framhaldandi at bjóða seg fram á pensjónsmarknaðinum, og verður nógv orka løgd í eitt tætt samstarv við fakfeløg. Felagið er í dag einasta felag, ið gevur sínum viðskiftafólki fult gjøgnumskygni, og hevur tey amboð, ið krevjast til hetta.
Hetta eigur at vera ein týðandi partur, tá eitt fakfelag ella virki skal velja sína eftirlønarskipan. Í desember 2009 bleiv ein broyting av rentutryggingarlógini skundað gjøgnum Løgtingið. Tað mesta, ið kann rindast inn á kapitalpensjónir, bleiv broytt til 25 tús. kr., og loft var sett á inngjaldið til lutapensjónir. Eftir okkara tykki var tað sera óheppið at koma við broytingum, nú partarnir á arbeiðsmarknaðinum í eina tíð hava samráðst um ein pensjónsreform, og kann hetta koma at skaða tær komandi samráðingarnar. Hetta kann eisini fáa eina neiliga ávirkan á søluna av pensjónum í 2010.
Mett verður, at Betri Pensjón P/F eisini í 2010 vil hava eitt hall. Inntøkurnar eru mettar til 90 mió. kr og hallið eftir skatt til 4 mió. kr.

## FÍGGJARÚTLITINI FYRI 2010

Nú heimsins búskapir hava ella eru um at fáa vøkstur aftur, eru nógv viðurskifti, sum tala fyri, at 2010 kann gerast eitt nøktandi partabrævaár. Alheims virkir hava framt stórar sparingar, og hetta hevur ført við sær, at úrslitini hava verið lutfalsliga góð. Enn er tó eftir at fáa søluna og bruttovinningin á nøktandi stig aftur. Fyri hesum talar, at búskapirnir aftur hava vøkstur, og at arbeiðsloysið væntandi nær hæddina í 2010, fyri síðani at lækka. Tískil eru eisini útlit fyri, at privatnýtslan í USA aftur fer at stimbrast, so at búskaparliga lokomotivið, USA, kann toga aðrar búskapir fram eisini. Í 2009 varð mangan ført fram, at búskapirnir kundu fara at lækka aftur, fyri síðani endaliga at hækka. Betri Pensjón P/F mælir ikki til, at kundarnir taka á seg størri váða enn tíðarskeiðið til eftirlønaraldur og váðafýsnið annars tala fyri.

## NÝGGJUR PENSJÓNSREFORMUR ÁVEGIS

Fíggjarmálaráðið hevur í longri tíð arbeitt við ætlanum um at seta ein pensjónsreform í gildi, seinast hava teir boðað frá, at hesin kemur í gildi 1. januar 2011. Betri Pensjón P/F fegnast um reformin, og er samstundis til reiðar at taka ímóti broytingini.
Vit fara í 2010 at fylgja gongdini, nú uppskotið væntandi verður sent til hoyringar og politiska viðgerð, og gera okkara ýtasta til at vit fáa ein tíðarhóskandi reform, øllum at gagni.

## SERLIGAR HENDINGAR

Frá degnum fyri fíggjarstøðuna til í dag eru ongar hendingar farnar fram, sum ávirka metingina av ársfrásøgnini.

## EIGARAVIÐURSKIFTI

Betri Pensjón P/F er systurfelag hjá Tryggingarfelagnum Føroyum P/F. TF Holding P/F eigur bæði feløguni 100%.


Nýttur roknskaparháttur · 5 ára yvirlit
Ársfrásøgn 1. januar – 31. desember
Fíggjarstøða 31. desember
Notur til ársfrásøgnina · Leiðsluátekning
Átekning frá óheftum grannskoðarum

# Nýttur roknskaparháttur

## Alment

Ársfrásøgnin er gjørd sambært viðtøkum og eftir teimum krøvum, sum Løgtingslóg um tryggingarvirksemi ásetir. Harumframt hevur felagið í tann mun tað hevur verið møguligt, sett ársfrásøgnina upp í samsvari við kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir. Hendan kunngerð er komin í gildi 1. januar 2010, og er sostatt fyrst galdandi fyri ársfrásagnina fyri 2010.

### AVRUNDING AV UPPHÆDDUM
Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og samløguna av einstøku upphæddunum.

### UM INNROKNAN OG VIRÐISÁSETING Í ÁRSFRÁSØGNINI
Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur nýttar til at røkka ársins inntøku verða tiknar við í rakstrarroknskapin.

### KONSERNVIÐURSKIFTIR OG NÆRSTANDANDI PARTAR
Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreiddar til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

### UMROKNING AV ÚTLENDSKUM GJALDOYRA OG KURSTRYGGJAN
Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrar upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

## Rakstrarúrslit 2009

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2009 eftir íkastmeginregluni (kontributión), sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

### RAKSTRARROKNSKAPURIN
Í rakstrarroknskapinum eru tiknar allar inntøkur, so hvørt tær eru innvunnar og allur kostnaður, so hvørt hann er kendur.

### TRYGGINGARGJØLD
Tryggingargjøld og innskot verða innroknað í fíggjarstøðuna tá tey falla til gjaldingar.

### ÚRSLIT AV ÍLØGUVIRKSEMI
Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. umfata ársins rentuinntøkur av innlánum, virðisbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum. Virðisjavningar umfata ársins virðisjavningar av virðisbrøvum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

### TRYGGINGARVEITINGAR
Goldnar veitingar umframt broyting á avsetingum til endurgjøld frádrigið endurtryggjarans part verða innroknaðar sum tryggingarveitingar.

### RAKSTRARKOSTNAÐIR AV TRYGGINGARVIRKSEMI
Hesir kostnaðir umfata kostnaðir til útvegan og fyrisiting av tryggingarmongdini íroknað kostnaðir í.s.v. útgjøld av veitingum.

### FLUTT ÚRSLIT AV ÍLØGUVIRKSEMI
Tann partur av úrsliti av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini, verður innroknaður í henda postin. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

### SKATTUR
Skattur av ársúrslitinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður innroknaður á eginognina.

Tann skattur, sum verður førdur í rakstrarroknskapin, verður flokkaður sum ávikavist skattur av vanligum rakstri og skattur av óvanligum upphæddum.

Broyting í útsettum skatti vegna broytt skattaprosent, verður innroknað í rakstrarroknskapin.

Felagið er samskattað við móðurfelagið TF Holding P/F, sum rindar samanlagda skattin fyri samtakið. Skattaávirkanin av samskattingini verður býtt millum tey samskattaðu feløgini í samtakinum í mun til skattskyldugu inntøkuna hjá feløgunum.

Í sambandi við skattliga viðgerð av virðisbrøvum nýtur felagið hin sonevnda goymsluháttin, sum m.a. viðførir, at allir kursmunir – staðfestir og óstaðfestir – verða taldir við í skattskyldugu inntøkuna.

## Fíggjarstøðan

### IMMATERIELL OGN
Immateriell støðisogn verður innroknað til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu nýtslutíðini, tó í mesta lagi í 20 ár.

Tey nýttu avskrivingartíðarskeiðini eru:

Menning av tryggingarproduktum 5 ár

Immateriell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

### MATERIELL STØÐISOGN
Materiell støðisogn verður innroknað til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu nýtslutíðini og mettum restvirði.

Kostprísur er útveganarprísur, umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Tey nýttu avskrivingartíðarskeiðini eru:

Innbúgv, edv-útgerð, bilar v.m. 3-7 ár

Materiell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

### ÍLØGUOGNIR
Fíggjarambоð verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning mátað til dagsvirði. Handlaði fíggjarambоð verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Sáttmálavirðið av handlaðum, men enn ikki avroknaðum fíggjarambоðum, verða tikin við sum eitt ískoyti ella ein frádráttur til tey tilsvarandi fíggjarambоðini.

Íløguprógv verða innroknað í fíggjarstøðuna saman við teimum undirliggjandi fíggjarognunum.

Dagsvirðið á børsskrásettum fíggjarambоðum verður ásett samsvarandi endakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni.

### ÁOGN
Dagsvirðið fyri áogn verður ásett við atliti at væntaðum tapi.

### AVSETINGAR TIL TRYGGINGAR- OG ÍLØGUAVTALUR
Tryggingartekniskar avsetingar til Unit Link avtalur eru virðisásettar til marknaðarvirðið á mótsvarandi virðisbrøvum. Tað er kundin, ið ber allan íløguváðan av Unit Link tryggingum og felagið hevur ikki tikið á seg nakran váða í hesum sambandi.

Avsetingar til endurgjøld umfata ikki goldnar, men falnar tryggingarveitingar. Í upphæddini er innroknað ein meting av falnum tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

### SKULD
Skuld verður mátað til amortiseraðan kostprís, og hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

### ÚTSETTUR SKATTUR
Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av aktivum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaaktiv, harundir skattavirðið av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, aktivið kann væntast at kunna avhendast fyri.

### AKTUELLUR SKATTUR
Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

### LYKLATØL
Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir.

# 5 ára yvirlit

| HØVÐUSTØL (KR. 1.000) | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | |
| Tryggingargjøld | 41.954 | 24.984 | 626 |
| Tryggingarveitingar | -754 | -174 | 0 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 9.673 | -7.715 | -116 |
| Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi | -13.475 | -11.390 | -3.614 |
| Úrslit av endurtrygging | -180 | -368 | 0 |
| Tryggingarteknisk úrslit | -12.601 | -11.002 | -3.530 |
| Ársúrslit | -7.182 | -12.759 | -3.256 |
| **FÍGGJARSTØÐA** | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur tilsamans | 68.344 | 21.966 | 528 |
| Eginogn tilsamans | 31.802 | 23.984 | 36.743 |
| Ognir tilsamans | 108.624 | 65.054 | 57.654 |

| LYKLATØL | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váðar** | | | |
| Kostnaðir í % av tryggingargjøldum | 32,1% | 45,6% | 577,3% |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 19,7% | 51,9% | 684,5% |
| Kostnaðir fyri hvøn tryggjaðan | 9.769 kr. | 20.356 kr. | 66.312 kr. |
| Kostnaðarúrslit | -29,0% | -100,0% | -1365,9% |
| Váðaúrslit | -3,6% | -5,0% | -28,8% |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | |
| Solvensdekningur | 118,4% | 80,7% | 128,8% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | -31,4% | -51,2% | -21,6% |
| Renting av eginogn eftir skatt | -25,7% | -42,0% | -17,7% |
| Renting av fíggjarognum | 13,1% | -16,9% | -0,3% |
| Renting av kundamiðlum | 19,6% | -31,3% | -51,0% |



# Ársfrásøgn 1. januar – 31. desember

## RAKSTRARROKNSKAPUR

| | NOTA | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. 1.000 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | | |
| Bruttotryggingarinntøkur | 1 | 42.134.318 | 25.351 |
| Endurtryggingargjøld | | -180.000 | -368 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning tilsamans** | | 41.954.318 | 24.984 |
| **Inntøkur frá íløguognum** | | | |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti | 2 | 1.616.688 | 986 |
| Kursjavningar | 3 | 8.948.952 | -7.938 |
| Rentuútreiðslur | | -664.969 | -700 |
| Fyrisitingarkostnaður í sambandi við íløguvirksemi | | -228.170 | -63 |
| **Inntøkur frá íløguognum tilsamans** | | 9.672.501 | -7.715 |
| **Tryggingarveitingar** | | | |
| Útgoldnar veitingar | 4 | -531.237 | 0 |
| Broyting í endurgjaldsavsetingum | | -222.856 | -174 |
| **Tryggingarveitingar tilsamans** | | -754.093 | -174 |
| **Broyting í avseting til Unit Link sáttmálar** | | -46.155.180 | -21.264 |
| **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi** | | | |
| Nýtekningarútreiðslur | 5 | -10.732.486 | -9.072 |
| Fyristingarkostnaður | 5 | -2.742.032 | -2.318 |
| **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi tilsamans** | | -13.474.518 | -11.390 |
| **Flutt avkast frá íløguognum** | | -3.843.781 | 4.557 |
| **Tryggingarteknisk úrslit av lívstryggingarvirksemi** | | -12.600.753 | -11.002 |
| **Eginpeningsins íløguavkast** | | 3.843.781 | -4.557 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | -8.756.972 | -15.559 |
| **Skattur** | 6 | 1.575.050 | 2.801 |
| **Rakstrarúrslit** | | -7.181.921 | -12.759 |

# Fíggjarstøða 31. desember

FÍGGJARSTØÐA

| OGN | NOTA | 2009 kr. | 2008 kr. 1.000 |
|---|---|---|---|
| **Immateriel ogn** | 7 | **3.382.500** | **4.613** |
| **Materiel støðisogn** | | | |
| Rakstrargøgn | | 7.412.210 | 9.455 |
| **Materiel støðisogn tilsamans** | 8 | **7.412.210** | **9.455** |
| **Íløguognir** | | | |
| Kapitalpartar | | 5.090.290 | 4.116 |
| Lánsbrøv | | 4.202.417 | 22.484 |
| **Fíggjaríløgur tilsamans** | | **9.292.707** | **26.600** |
| **Íløguognir tilsamans** | 9 | **9.292.707** | **26.600** |
| **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum** | 10 | **67.905.940** | **21.751** |
| **Aðrar ognir** | | | |
| Tøkur peningur | | 20.283.952 | 2.358 |
| **Aðrar ognir tilsamans** | | **20.283.952** | **2.358** |
| **Tíðaravmarkingar** | | | |
| Aðrar tíðaravmarkingar | | 346.703 | 277 |
| **Tíðaravmarkingar tilsamans** | | **346.703** | **277** |
| **OGN TILSAMANS** | | **108.624.012** | **65.054** |



# Fíggjarstøða 31. desember

FÍGGJARSTØÐA

| SKULD | NOTA | 2009 kr. | 2008 kr. 1.000 |
|---|---|---|---|
| **Eginogn** | | | |
| Partapeningur | | 37.500.000 | 30.000 |
| Yvirkursur við emissión | | 17.500.000 | 10.000 |
| Flutt yvirskot ella undirskot | | -23.197.537 | -16.016 |
| **Eginogn tilsamans** | 11 | **31.802.463** | **23.984** |
| **Avsetingar til tryggingar- og íløgusáttmálar** | | | |
| Endurgjaldsavsetingar | | 438.423 | 216 |
| Avsetingar til Unit Link sáttmálar | 12 | 67.905.940 | 21.751 |
| **Tryggingartekniskar avsetingar tilsamans** | | **68.344.363** | **21.966** |
| **Avsettar skyldur** | | | |
| Avsett til útsettan skatt | 6 | 1.937.640 | 2.525 |
| **Avsettar skyldur tilsamans** | | **1.937.640** | **2.525** |
| **Skuld** | | | |
| Skuld í sambandi við trygging | | 137.572 | 34 |
| Millumrokning við tilknýttar fyritøkur | | 3.440.909 | 15.674 |
| Annað | | 488.825 | 501 |
| **Skuld tilsamans** | | **4.067.306** | **16.209** |
| **Tíðargreiningar** | | **2.472.239** | **369** |
| **SKULD TILSAMANS** | | **108.624.012** | **65.054** |
| Eventualskyldur og trygdarveitingar | 13 | | |
| Nærstandandi partar | 14 | | |
| Viðkvæmisgreining av fíggjarognum | 15 | | |
| Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og stað | 16 | | |

# Notur til ársfrásøgnina

| | NOTA | 2009 kr. | 2008 kr. 1.000 |
|---|---|---|---|
| **Bruttotryggingarinntøkur** | 1 | | |
| Áhaldandi inngjøld | | 13.305.709 | 7.951 |
| Eingangsinngjøld | | 27.349.884 | 16.641 |
| Inntøkur frá samlagstryggingum | | 1.478.724 | 759 |
| | | **42.134.318** | **25.351** |
| **Herav inngjøld** | | | |
| úr Føroyum | | 42.134.318 | 25.351 |
| úr EU-londum | | 0 | 0 |
| úr øðrum londum | | 0 | 0 |
| | | **42.134.318** | **25.351** |
| Tryggingargjøld frá Unit Link tryggingum | | 42.134.318 | 25.351 |
| Tryggingargjøld við rætt til bonus | | 0 | 0 |
| **Tal av tryggjaðum persónum** | | | |
| Individuelt teknaðar tryggingar | | 322 | 134 |
| Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | | 1.311 | 903 |
| Samlagstryggingar | | 610 | 276 |
| **Rentuinntøkur og vinningsbýti** | 2 | | |
| Rentir av virðisbrøvum, innlánum og útlánum | | 122.089 | 82 |
| Vinningsbýti frá kapitalpørtum | | 1.494.599 | 903 |
| | | **1.616.688** | **986** |
| **Kursjavningar** | 3 | | |
| Íløgubrøv | | 3.075.423 | -15.970 |
| Lánsbrøv | | 5.873.530 | 8.032 |
| | | **8.948.952** | **-7.938** |
| **Útgoldnar veitingar** | 4 | | |
| Tryggingargjøld við deyða | | -500.000 | 0 |
| Afturkeyp | | -31.237 | 0 |
| | | **-531.237** | **0** |
| **Nýtekningar- og fyrisitingarútreiðslur innihalda** | 5 | | |
| **Starvsfólkakostnað** | | | |
| Lønir | | -3.142.782 | -3.127 |
| Eftirlønir | | -426.025 | -392 |
| Aðrir kostnaðir til almannatrygd | | -120.206 | -104 |
| Lønarhæddaravgjald | | -162.125 | -164 |
| Aðrir starvsfólkakostnaðir | | -219.316 | -192 |
| | | **-4.070.453** | **-3.978** |
| **Herav løn og samsýning til nevnd og stjórn** | | | |
| Nevndarsamsýning | | 0 | -16 |
| Stjórn | | -1.008.917 | -840 |
| **Fulltíðarstørv** | | **5** | **5** |



# Notur til ársfrásøgnina

| | NOTA | 2009 kr. | 2008 kr. 1.000 |
|---|---|---|---|
| **Samsýning til grannskoðarar** | 5 | | |
| **NOTA, løggilt grannskoðanarvirkið P/F** | | | |
| Grannskoðan | | -127.500 | -128 |
| Aðrar tænastuveitingar | | -69.375 | -131 |
| **HanSam, granskoðarafelag Sp/f** | | | |
| Grannskoðan | | -16.875 | -16 |
| **Samlaðar útreiðslur til grannskoðarar** | | **-213.750** | **-274** |
| **Skattur** | 6 | | |
| Úrslit áðrenn skatt | | -8.756.972 | -15.559 |
| **Skattur 18%** | | **1.576.255** | **2.801** |
| Aktuellur skattur | | 988.190 | 2.364 |
| Broyting í útsettum skatti | | 586.860 | 437 |
| **Skattur sambart ársfrásøgn** | | **1.575.051** | **2.801** |
| Verandi munir | | 1.204 | 0 |
| **Avstemmað skattaupphædd** | | **1.576.255** | **2.801** |
| **Útsettur skattur** | | | |
| Immateriell støðisogn | | -608.850 | -830 |
| Rakstrargøgn | | -1.328.790 | -1.694 |
| **Samlaður útsettur skattur** | | **-1.937.640** | **-2.525** |
| **Immateriellar ognir** | 7 | | |
| Útveganarvirði 1. januar | | 6.150.000 | 6.150 |
| Frágongd í árinum | | 0 | 0 |
| Tilgongd í árinum | | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | | **6.150.000** | **6.150** |
| Avskrivingar 1. januar | | -1.537.500 | -307 |
| Avskrivingar uppá seldar ognarlutir | | 0 | 0 |
| Avskrivingar í árinum | | -1.230.000 | -1.230 |
| **Avskrivingar 31. desember** | | **-2.767.500** | **-1.537** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember** | | **3.382.500** | **4.613** |
| **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | | **4.612.500** | **5.843** |
| Verður avskrivað yvir | | 5 ár | 5 ár |

# Notur til ársfrásøgnina

| | NOTA | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. 1.000 |
| **Rakstrargøgn** | 8 | | |
| Útveganarvirði 1. januar | | 11.975.338 | 11.088 |
| Frágongd í árinum | | 0 | 887 |
| Tilgongd í árinum | | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | | **11.975.338** | **11.975** |
| Avskrivingar 1. januar | | -2.519.916 | -477 |
| Avskrivingar uppá seldar ognarlutir | | 0 | 0 |
| Avskrivingar í árinum | | -2.043.212 | -2.043 |
| **Avskrivingar 31. desember** | | **-4.563.128** | **-2.520** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember** | | **7.412.210** | **9.455** |
| **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | | **9.455.422** | **10.611** |
| Verður avskrivað yvir | | 3-7 ár | 3-7 ár |

| | NOTA | Roknskaparligt virði | |
|---|---|---|---|
| **Útgreinan av íløguognum** | 9 | | |
| | | Ársbyrjan | Árslok |
| | | tkr. | tkr. |
| Útlendsk partabrøv skrásett á virðisbrævamarknaði | | 4.115.973 | 5.090.290 |
| **Kapitalpartar, samlað** | | **4.115.973** | **5.090.290** |
| Statslánsbrøv | | 3.597.411 | 672.387 |
| Realkreditlánsbrøv | | 18.886.409 | 3.530.030 |
| **Lánsbrøv, samlað** | | **22.483.820** | **4.202.417** |
| **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum** | 10 | | |
| **Býti av íløguognum uttan trygd/garanti** | | | |
| Partabrøv | | 33.401.330 | 11.380 |
| Lánsbrøv | | 34.504.610 | 10.371 |
| **Íløguognir tilknýttar Unit Link sáttmálum, samlað** | | **67.905.940** | **21.751** |



# Notur til ársfrásøgnina

| | NOTA | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. 1.000 |
| **Eginogn** | 11 | | |
| **Partapeningur** | | | |
| Partapeningur 1. januar | | 30.000.000 | 30.000 |
| Hækking í árinum | | 7.500.000 | 0 |
| | | **37.500.000** | **30.000** |
| **Yvirkursgrunnur** | | | |
| Yvirkursgrunnur við emmissión 1. januar | | 10.000.000 | 10.000 |
| Hækking í árinum | | 7.500.000 | 0 |
| | | **17.500.000** | **10.000** |
| **Fluttur vinningur** | | | |
| Fluttur vinningur 1. januar | | -16.015.616 | -3.257 |
| Flutt frá ársúrslitinum | | -7.181.921 | -12.759 |
| Uppskot til vinningsbýti | | 0 | 0 |
| | | -23.197.537 | -16.016 |
| **Eginogn 31. desember** | | **31.802.463** | **23.984** |

**Partapeningur**

Samlaði partapeningurin hjá felagnum er eitt partabræv á 30.000 tkr. og eitt á 7.500 tkr., ið TF Holding P/F eigur.

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| **Grundarfæfeingið og fæfeingiskrav** | | |
| Eginpeningur | 31.802.462 | 23.984 |
| Immateriel ogn | -3.382.500 | -4.613 |
| Uppskot til vinningsbýti | 0 | 0 |
| Útsett skattaáogn | 0 | 0 |
| **Grundarfæfeingið** | **28.419.962** | **19.372** |
| **Fæfeingiskrav** | **24.000.000** | **24.000** |

# Notur til ársfrásøgnina

| | NOTA | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. 1.000 |
| **Avseting til Unit Link sáttmálar** | 12 | | |
| Avseting primo | | 21.750.760 | 528 |
| Afturkeyp | | -31.237 | 0 |
| Bruttotryggingarinntøkur | | 42.134.318 | 25.351 |
| Rentir vm. | | 6.056.891 | -3.095 |
| Tryggingargjøld | | 0 | 0 |
| Umsitingargjald | | -359.766 | -137 |
| Váðaúrslit | | -1.645.026 | -897 |
| **Avseting ultimo** | | **67.905.940** | **21.751** |
| | | | |
| **Eventualskyldur og trygdarveitingar** | 13 | | |
| Sum trygd fyri tryggingartekniskar avsetingar eru skrásettar ognir uppá | | 97.555.567 | 47.921 |

## Nærstandandi partar

14

**Nevndu feløg hava týðandi ávirkan á Betri Pensjón P/F**

| Navn og Heimstaður | Grundarlag fyri ávirkan |
|---|---|
| TF Holding P/F<br>Kongabrúgvin<br>Postboks 329<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag |

**Samhandil við nærstandandi partar í roknskaparárinum**

| Navn og Heimstaður | Grundarlag fyri ávirkan | Samhandil |
|---|---|---|
| TF Holding P/F | Móðurfelag | Fyrisitingargjald<br>Rentir av millumrokning |
| Tryggingarfelagið Føroyar P/F | Dóttirfelag | Fyrisitingargjald<br>Rentir av millumrokning |

## Viðkvæmisgreining av fíggjarognum

15

| Hending | Minsta ávirkan á grundarfæfeingið í lumn. |
|---|---|
| Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig | -133 |
| Rentulækking uppá 0,7 prosent stig | 133 |
| Partabrævalækking á 12 prosent | -611 |
| Ognarprísalækking á 8 prosent | - |
| Valutakursváði (VaR 99,5 prosent) | - |
| Tap uppá mótpartar | - |
| Lækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í óarbeiðstali á 10 prosent | - |

Felagið hevur ikki gjørt avtalu um nakrar samløgubónusskipanir, og tí hava omanfyri nevndu hendingar onga ávirkan á felagið í mun til bónusmøguleikar.

# Notur til ársfrásøgnina

**Nota 16**

## BÝTI AV SAMLAÐUM ÍLØGUOGNUM Á VIRKISØKI OG STAÐ

| | Føroyar | Evropa annað | Norður Amerika | Suður Amerika | Japan | Miðeystur annað | Onnur lond | Ei sundur-greina | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka | - | 4,3% | 2,1% | - | - | - | - | - | 6,4% |
| Atfeingi | - | 8,6% | 1,2% | - | 0,7% | - | - | - | 10,5% |
| Ídnaður | - | 15,8% | 2,4% | - | 1,6% | 2,0% | - | - | 21,8% |
| Nýtsluvørur | - | 3,2% | 2,2% | - | 0,7% | - | - | - | 6,2% |
| Brúkaravørur | - | 9,9% | 1,4% | 1,8% | 5,8% | - | - | - | 18,8% |
| Heilsuviðgerð | - | 4,8% | 1,7% | - | 0,6% | - | - | - | 7,1% |
| Fígging | - | 10,6% | 2,7% | - | 4,7% | 0,4% | - | - | 18,3% |
| KT | - | 2,1% | 4,0% | - | 2,2% | 0,2% | - | - | 8,4% |
| Fjarsamskifti | - | 0,5% | 0,5% | - | 0,9% | - | - | - | 1,8% |
| Veiting | - | 0,2% | 0,3% | - | 0,1% | - | - | - | 0,6% |
| Ikki sundurgreinað | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Tilsamans | - | 60,0% | 18,4% | 1,8% | 17,3% | 2,6% | - | - | 100,0% |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársfrásøgnina fyri 2009 hjá Betri Pensjón P/F.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2009, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2009.

**BETRI PENSJÓN P/F**
Tórshavn, hin 9. mars 2010

**STJÓRN:**
Mortan Poulsen

**NEVND:**
Gunnar í Liða, formaður · Jákup Birgir Mohr · Regin Hammer



Frá vinstru: Regin Hammer, Gunnar í Liða, Jákup Birgir Mohr og Mortan Poulsen



# Átekning frá óheftum grannskoðarum

## TIL PARTAEIGARARNAR Í BETRI PENSJÓN P/F

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Betri Pensjón P/F fyri roknskaparárið 2009, við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn, og notum fyri felagið. Ársfrásøgnin er gjørd eftir lóg um tryggingarvirksemi.

## ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV ÁRSFRÁSØGNINI

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársfrásøgn kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

## GRANNSKOÐANIN OG ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, harundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31.12.09 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 2009 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Tórshavn, hin 9. mars 2010

**NOTA**
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

*Hans Laksá*
*Løggildur grannskoðari*

*Joen Magnus Lamhauge*
*Skrásettur grannskoðari*

**HANSAM**
Grannskoðarafelag Sp/f

*Óli Regin Hansen*
*Skrásettur grannskoðari*

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Telefon: 345 700 · www.betri.fo